SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Tað var eitt mistak av Sovjetsamveldinum og USA at beina fyri teimum langtberandi kjarnorkurakettunum*

*(Sergej Ivanov)*

# 127 rúmdarsteinar kunnu raka Jørðina

**Amerikanska rúmdarumsitingin heldur eyga við 127 rúmdarsteinum, sum kunnu raka Jørðina, og ST mælir til at finna eina skipan, sum kann steðga teimum næskastu**

Á amerikonsku rúmdarumsitingini NASA halda vísindafólk í løtuni eyga við 127 rúmdarsteinum, sum hava eina kós, ið ger, at teir kunnu raka Jørðina. Ein av vísindamonnunum sigur við BBC, at nútímans tøkni ger tað møguligt at finna altsamt fleiri slíkar rúmdarsteinar, og at vandin fyri einum samanstoyti økist tilsvarandi. Hann leggur afturat, at sambært einari meting hjá NASA eru kanska einir 20.000 aðrir vandamiklir rúmdarsteinar, sum eingin hevur fingið eyga á enn.

Í ST verður arbeitt við einari ætlan um, hvussu vit kunnu fyribyrgja, at ein stórur rúmdarsteinur skal raka Jørðina. Eitt uppskot er at skjóta rakettir eftir teimum og at spreingja teir, og eitt annað uppskot er at lata rakettir broyta kósina hjá steinunum, so teir fara fram við Jørðini.

Tann stóri spurningurin er, hvør skal gjalda eina slíka verjuskipan, og tað orðaskiftið verður neyvan liðugt fyrr enn um eini tvey ár, sigur BBC.



*NASA heldur eyga við 127 rúmdarsteinum, sum kunnu raka Jørðina, men tað veruliga talið er helst nógv størri.*

# Ivanov nærkast forsetasessinum

**Í Russlandi er Sergej Ivanov, verjumálaráðharri tilnevndur varaforsætisráðharri, og tað kann vera eitt tekin um, at hann skal taka við eftir Vladirmir Putin**



*Sergej Ivanov. Verður tað hann, sum skal loysa Vladimir Putin av næsta ár?*

Tíðinini um broytingina komu í einari beinleiðis sjónvarpssending frá stjórnarfundi í Moskva.

Sum varaforsætisráðharri fær tann 52 ára gamli Sergej Ivanov millum annað ábyrgdina av tí hernaðarliga partinum av russiska ídnaðinum, eins og hann fær rættiliga stóra ávirkan á búskaparpolitikkin hjá stjórnini.

Politiskir eygleiðarar í Moskva siga, at avgerðin hjá Vladimir Putin at geva Sergej Ivanov sæti sum varaforsætisráðharri kann vera ein ábending um, at hann vil hava verjumálaráðharran at loysa seg av, tá forsetaval verður í Russlandi næsta ár. Putin er sera væl umtóktur, og tí hevur tað stóran týdning, hvønn hann vil hava sum eftirmann, nú hann sambært grundlógini ikki kann stilla uppaftur, skrivar NTB.

Vladimir Putin og Sergej Ivanov kenna hvør annan væl, og teirra fortíð er eisini lík. Eins og Putin var Ivanov yvirmaður í loyniligu trygdartænastunum KGB og FSB í 20 ár, og harafturat eru báðir ættaðir úr Skt. Pætursborg. Ivaleyst er tað eisini ein fyrimunur fyri Ivanov, at tað mesta av síni tíð sum fregnartænastumaður arbeiddi hann uttanlands, og tí dugir hann millum annað flótandi enskt og svenskt.

## STUTT SAGT

### Misrak var orsøkin

Russisku myndugleikarnir hava nú staðfest, at eitt menniskjaligt mistak var orsøkin til, at eitt russiskt flogfar við 170 fólkum umborð datt niður nærhendis ukrainska býnum Donetsk í august í fjør. Kanningarnar hava avdúkað, at annar flogskiparin var ikki liðugur við útbúgvingina, og at tað var hann, sum sat við róðrið, tá vanlukkan hendi, hóast veðrið var vánaligt. Flogfarið var á veg úr frítíðarbýnum Anapa í Suðurrusslandi til Skt. Pætursborg, tá tað datt niður. Øll tey 160 ferðafólkini og manningin, sum taldi 10, doyðu.

### Harða revsing

Tann 52 ára gamli Gujko Jankovic hevur fingið 34 ára fongsul fyri krígsbrotsverk í borgarakrígnum í Bosnia í árunum frá 1992 til 1995. Gujko Jankovic stóð á odda fyri einum serbiskum herliði. Í 1992 tóku menn hansara muslimska býin Foca har eysturi í Bosnia. Undir rættarmálinum kom fram, at hermenninir hjá Gujko Jankovic myrdu sjey menn býnum, fleiri fólk vórðu burturflutt, og seks kvinnur vórðu neyðtiknar. Tann yngsta var bara 12 ára gomul.

### Taleban mennir seg

Afghanska rørslan Taleban fær altsamt størri og størri undurtøku millum fólkið, og sambært pakistanska guvernørinum Jan Orakazi er rørslan vorðin ein rættilig avbjóðing til teir útlendsku NATO-hermenninar. Orakazi, sum er guvernørur í einum landsparti við afghanska markið, sigur við AP, at tað er ikki óhugsandi, at Taleban hevur fingið hermenn úr Pakistan, men hann ivast kortini ikki í, at tað eru serliga misnøgdir afghanar, sum eru farnir upp í part við Taleban. Rørslan hevur boðað frá, at hon fer at seta eitt stóráløp í verk í vár.